# Skemman er fyri alt landið




**Skemman telist millum størstu handilshús í landinum. Virksemið fevnir víða, og tað ger kundaundirlagið eisni, tí Skemman hevur kundatænastu kring alt landið**

Skemman er handiulshús, ið er sett á stovn í 1986.
Skemman er partvís partur av handilsketuni Jysk, og fevnir úrvalið í hesum sambandið um eittnú dýnur, madrassur og handklæði.

Men umframt hevur Skemman innbúgv og smærri lutir til heimini.

Eisini er úrvalið ávirkað av ymsu árstíðunum.

Um summarið eru eittnú havamøblar og grillir á skránni, og nú jólini eru í hondum, setir eisini hetta dám á úrvalið við jólaprýði.

Skemman er eitt av stóru handilshúsunum í landinum. Skemman er partur av handilsketuni Jysk, og sleppur at nýta navnið, men sleppur eisini at leggja afturat úrvalinum, og hevur harvið rúmari ræsur, enn sjálv Jysk-ketan.

## Íslendskir fyrimunir

Jákup á Dul, ið stovnaði fyritøkuna, hevur í dag eisini nógv virksemi í Íslandi, og Skemman kann við fyrimuni samstarva við íslendsku sambondini.

## Kring alt landið

Hóast Skemman ikki hevur deild aðrastaðni, enn í Havn, so fevnir kundatænastan kring alt landið.

Skemman selur og sendir kring alt landið, og hevur sambond við flutiningsfyritøkur, og til ber eisni at nýta post.

Annars vitja avbygdafólk javnan innar á gólvið í Skemmuni, har stóra úrvalið ger handilshúsið eina vitjan verda.

Eini 18 fólk eru í føstum starvi í Skemmuni, men t.d. um jóltíðir eru fleiri og taka hond í, og talið av starvsfólkum er hesa tíðina á leið 25.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















